## DAGSINS MEINING

# Samhaldsfesti og sjálvsálit

Mikukvøldið vóru vit vitni til størstu ítróttarhending nakrantíð í Føroyum. Fleirfaldu týsku heimsmeistararnir vitjaðu. Í sær sjálvum er tað framúr, at Føroyar hava møguleika at fáa sovorna vitjan. Europeiska og altjóða fótbóltssamgongurnar eiga stórt rós uppiborið fyri, at tær geva smáu tjóðunum møguleikan at kappast undir somu treytum, sum tær stóru gera. Eitt nú Franz Beckenbauer, kendi týski spælarin og venjarin, hevur fleiri ferðir sagt, at tað hevði verið rættari, um smáu tjóðirnar í innanhýsis kapping gjørdu av, hvør av teimum skuldi kappast við stóru tjóðirnar. Tíbetur hevur hetta sjónarmiðið ikki vunnið frama, og vónandi fer tað ikki at gera tað.

Síðani Føroyar í 1990 fóru upp í altjóða fótbóltskappingar hevur gongdin fyri tað mesta verið rætta vegin. Mikukvøldið varð við sjey tumma seymi sligið fast, at tað er upp á sítt pláss, at Føroyar eru við í altjóða kappingum. Tað er at vóna, at FIFA og UEFA lurta meiri eftir tí, ið gekk fyri seg á vøllinum, enn teir lurta eftir formonnum og stjórum í stóru europeisku feløgunum, sum vilja, at spælararnir heldur brúka meiri tíð og orku upp á Europa Cup, enn at teir brúka tíð og orku upp á at spæla landsdystir ímóti smátjóðunum.

Í sær sjálvum er tað altíð fasinerandi, tá ið tann lítli stríðist ímóti tí stóra. Serliga tá ið tann stóri ikki fær tey nógvu málini og vinnur stórsigurin, sum tað eigur at verða roknað við, at hann skal gera. Heilt víst er tað, at tað mikukvøldið sótu nógvar milliónir frammanfyri sjónvarpsskíggjar kring heimin og tóku á við Føroyum. Føroyar vunnu sær kreditt kring heimin.

Hvønn týdning tað hevur fyri Føroyar,at taka lut í so stórum kappingum, ber tað neyvan til at gera upp í pengum. Men tað er einki at ivast í, at tað eru nógvar milliónir. Eitt eru pengarnir, sum FSF og fótbóltsfeløgini fáa frá UEFA og FIFA. Tað eru nakrar milliónir um árið. Men tað eru heilt víst nógv fleiri milliónir, ið á annan hátt renna inn í føroyska húsarhaldskassan, og tað kann kanska renna uppaftur meiri henda vegin.

Ferðavinnan eigur í framtíðini at fáa gagn av, at kunnleikin um Føroyar í síni heild hesa tíðina er vaksin so nógv, tí Føroyar eru í bólki við Týsklandi. Stóri spurningurin er nú, hvussu Føroyar og ferðavinnan fara at megna at arbeiða víðari við hesum møguleikunum. Tað er upp til okkum sjálvi at gera tað av.

Eitt annað er, at Føroyar og útflutningsvinnan eigur at fáa goodwill burturúr positivu umrøðuni, ið fótbólturin gevur. Tað munnu vera nógvar samrøður við útlendsk viðskiftafólk, sum hesa seinatu tíðina hava havt ein fótbóltsligan inngang og kanska eisini útgang. Tað ber illa til at gera hetta upp í pengum, men tað eru heilt víst pengar í hesum, og vit kundu tikið onnur dømi um goddwill, ið fótbólturin ber við sær.

Føroysku fótbóltsfeløgini, FSF og spælararnir eru fremsta orsøkin til, at hetta ævintýrið er og vónandi framvegis verður ein góður veruleiki. Kommunurnar og landið hjálpa væl til við vøllum og karmum, og soleiðis eigur tað framvegis at vera.

Spælararnir vístu mikukvøldið, at tá ið teir arbeiða saman, og ein spælir fyri allar og allir fyri ein, sum Frank Arnesen og danska landsliðið sungu fyri næstan tjúgu árum síðani, so hilnast tað væl.

Hóast týskararnir at enda gjørdu tvey mál, eigur føroyska avrikið at vera undirstriking fyri øllum føroyingum um, at vit kunnu. Hóast vit eru smáir, kunnu vit vera knáir, og vit eiga ikki at smæðast burtur. Ikki í fótbólti og øðrum ítrótti, ikki í aðrari mentan og heldur ikki í vinnulívi, búskapi, politikki og á øllum øðrum økjum. Tað ræður um at arbeiða saman innanhýsis og at skapa gleðina og sjálvsálitið, ið skulu til. So skal tað nokk ganga væl. Tað vístu fótbóltsspælarnir aftur mikukvøldið, at tað kann gera. Takk fyri tað og góða eydnu.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Framhaldandi afturi í skjútstíðini

**Høgni Hoydal**



Lisbeth L. Petersen, fólkatingskvinna fyri Føroyar, hevur skrivað eina grein, sum eitur "framhaldandi í ríkisfelagsskapi".

Greinin er eftir mínum tykki ótrúliga góð og upplýsandi.

Hon sigur okkum so greitt, hvar vit høvdu verið í Føroyum, um sambandsafturhaldið hevði vunnið. Vit høvdu sitið afturi í skjútstíðini. Nøkur fá tandur her á klettunum. Uttan egið mál, uttan egnar lógir og uttan nakran framburð í einum danskari koloni. Har politikkur hevði snúð seg um at liffra fyri donsku stjórnini, og billa "det fattige folk udi Færø" inn, at danskir myndugleikar vita best og vit eiga bert at lurta eftir teimum.

**Verjan hjá donsku stjórnini**

Eitt er, at greinin hjá Lisbeth sum vanligt onki boð hevur uppá nakran politikk ella framtíðarhugsan. Tað hava vit vant okkum við. Men annað er, at greinin er ein long verjurøða fyri grovheitum hjá donsku stjórnini mótvegis føroyskum myndugleikum.

Lisbeth L. Petersen ber beinleiðis í bøtuflaka fyri, at danska stjórnin enn einaferð setur føroyskt fólkaræði til viks í málinum um hernaðarlógirnar.

At danska stjórnin lýsir hernaðarlógir, sum eitt samt Løgting hevur samtykt skulu strikast, rópar Lisbeth "eitt óheppið mistak". Men um tað var eitt "óheppið mistak", hví varð tað so ikki rættað í Fólkatinginum, tá Torbjørn Jacobsen legði uppskot fram um tað?

Og Lisbeth L. Petersen sigur ósatt fyri øllum Føroya fólki, tá hon skrivar í síni grein at lógirnar bert galda fyri danskar hermenn í Føroyum. Tað passar als ikki, hóast danska stjórnin hevur ført somu ósanndini fram í Fólkatinginum.

**Lógirnar taka rættindi frá tær og mær**

Lógirnar og kunngerðirnar, sum danska stjórnin hevur sett í verk beint ímóti einum samdum Løgtingi, geva m.a. donskum myndugleikum heimild:

- at taka fasta ogn frá føroyingum, um tað verður mett neyðugt
- at seta fólk úr sínum egnu húsum, um tað verður hildið verða neyðugt
- at handtaka og revsa fólk, ið verða hildin ganga ímóti áhugamálum hjá donsku stjórnini í eini krígsstøðu (sum tildømis nú Irak-kríggið vardi).

Tí tekur danska stjórnin beinleiðis rættindi frá øllum føroyingum við at lýsa hesar lógir og hetta hevur onki við danskar hermenn at gera.

**Villeiðing**

Men tað er nokk eitt "mistak" og hevur nakar feilin, so má tað vera landsstýrið, heldur Lisbeth.

Lisbeth L. Petersen villleiðir altso beinleiðis um eitt mál, sum hon ikki færri enn tríggjar ferðir hevur havt til viðgerðar. Tvær ferðir sum Løgtingslimur, tí fyrst undirritaði og síðani javnaðarflokkurin løgdu uppskot fram um at taka av hernaðarligu revsilógirnar. Og eina ferð sum fólkatingslimur, tí Torbjørn Jacobsen legði fram uppskot um at seta lógirnar úr gildi aftur.

Antin hevur Lisbeth L. Petersen als ikki sett seg inn í, hvat málið snýr seg um, og hevur bert endurtikið ósannindir sum danska stjórnin og hennara fólkatingsbólkur (Venstre) hava skrivað og ført fram

Ella sigur hon ósatt við vilja.

Hvørgin hesin møguleikin er tespiligur at hugsa sær.

**Hurrá fyri donskum valdi í Føroyum**

"Framhaldandi í ríkisfelagsskapi" sigur Lisbeth. Ja, tað skal eg halda við. Hurrá fyri tí fantastiska ríkisfelagsskapinum - har danska stjórnin gongur beint ímóti okkara samtyktum og enntá fær ein føroyska fólkatingslim at verja seg og endurtaka ósannindir í føroyskum fjølmiðlum.

Tillukku við tí, Lisbeth. Nú kunnu vit øll ganga við røttum ryggi.

# Um verkfall

**Sólvit Simonsen**



Ja, so var verkfallið liðugt tíbetur, ja, lat meg siga beinanvegin, at eg havi gingið og krimpað meg við, hvussu verður vorðið við virkjunum hjá Sandoy Seafood? Rísa tey undir hesum? Tíverri ljóðar tað aðrastaðni í landinum sum um virki eru, sum koma at snara lykilin um, og má tað sigast at vera ein bygda- og landsskaði. Hvat er so fingið burtur úr verkfallinum. Jú, frá fyrsta semingsuppskoti og til verkfalslok bleiv tað ein króna afturat tímalønini. Hetta er ikki tað stóra, tað er jú nemt at rokna seg fram til, at hetta gevur ca. 2.000 kr. um árið. Túsund av teimum fara í skatti og vónandi hendir tað ikki, at vøran fer upp, sum oftast hendir; men um so er, tá verður ikki nógv eftir, tá ið hugsað verður um ein mánaða mista inntøku. Sjálvur meti eg um leiðaran í Føroya Arbeiðarafelag, at hon er alt ov barsk og ódiplomatisk, tað kann væl ikki vera soleiðis, at hvør arbeiðsgevari er ein lítil bandittur. Vit hava roynt her í oynni at ligið við ongum, so tað vita vit hvat tað hevur at týða.

Tað bleiv tosað nógv undir verkfallinum um gjónna, sum ikki skuldi breiðka, og tað er rætt. Men so eitur eitt eisini at byggja brýr, tí tað er sera týdningarmikið við einum arbeiðsplássi, at tað er góður andi millum arbeiðsfólk og leiðslu, og í einigheit kann nógv vinnast.

Tað bleiv arbeitt fyri skattalætta til sjófólkið, sum kom ígjøgnum, og tað var sera gott at høvuðsvinnan verður stuðlað á slíkan hátt. Eftir mínari metan hevði tað verið ein góð loysn, um arbeiðsfólkið hjá fiskavirkjunum á landi kundi fingið ein tílíkan skattalætta, tí tey gera eitt dygdargott arbeiði fyri Føroya land, sum vit hava brúk fyri, og sum vit øll liva av. Tað hevði eisini verið við til at smalkað gjónna, og smalari gjógvin er, betur liggur fyri at byggja brúna.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Næstakærleiki hvat er tað?

**Anna Grástein**
*Århus*



Ein spurningur, ið verður stillaður mær ta seinastu tíðina í størri og størri umfang og eg helt meg hava fingið henda spurning nøktaðan við móðurmjólkini. Men má sanna at eg eri meir og meir í iva um týdningin av hesum og hvussu hesin verður umsitin av næsta tínum.

Johannes Møllehave, okkara kendi rithøvundur, ja, eg sigi okkara, moralskt havi eg ongan rætt at kalla hann okkara, men eg havi rætt til tað, tí eg eri danskur statsborgari, líkasum allir aðrir føroyingar eru tað – enn.

Neyvan hevði hann komið so langt í verkum sínum, um hann skuldi roynt seg sum føroyskan rithøvund. Hansara teologiska og filosofiska vitan er bæði rund, ikki dømandi og kærleikin streymar gjøgnum hansara teologisku frálæru, har ongin er minni ella størri enn tín næsti. Har tann kristni boðskapurin kemur fram í fullum blóma.

Mínar royndir kunnu bert staðfesta, at millum landsmenn mínar finna bert svartskygdir og falskir profetar fram í hjørtum teirra føroyinga.

JM sigur einastaðni, at næsti tín er t.d. hann, ið situr við síðuna av tær í einari tokkupé. Ein vakur og sannur tanki. Men tey flestu vildu svarað, nei, tín næsti er tín móðir, faðir, bróðir ella systir. Nú hava vit ikki tok ella tokkupé'ir í Føroyum. Men vit hava nógv hol, so har møtir tú neyvan nøkrum uttan súsandi bilum, ið fara framvið tær. Og hvør er so næsti tín? Jú, heilt givið, »tín granni«.

Føroyingar hava altíð breggjað sær av at vera tann tjóðin, ið tekur sær av sínum næsta, men hetta má eg tíverri avsanna uppá tað kraftigasta. Hetta, tí eg eigi eina mammu, ið slett og aldeilis ikki nýtir ágóðan av hesum. Eg havi altíð verið trygg við tankan um at hon flutti til Føroya fyri trimum árum síðan. Har vita øll alt um øll, tískil var eg vís í, at næstrakærleikstankin fór at hjálpa henni, um á stóð, nú hon var byrjað at eldast.

85 ár verður hon um nakrar fáar dagar. Seinastu jól fóru eg og familja mín til Føroya at halda jól, at halda jól saman við henni. Komin inn í stovu hennara síggi eg eina gamla kvinnu, ið tosar ørvitistos, hon er sterkt undirernerað og hevur ikki etið matartuggu í fleiri dagar og veit heldur ikki nær hon hevði etið seinast. Gamal, spiltur matur lá runt um hana og ógoldnu rokningarnar vóru nógvar. Hon var við at hvørva í egnari armóð og avmakt, men sat bert og ruggaði og helt væl standa til.

Eg bleiv ikki óð, men eg bleiv veruliga so uppøst, at eg hevði mestan hug at rópa og skríggja út yvir hav, fjøll og fólk, so alt Føroya fólk í tað minsta hoyrdu mína avmakt. Men ístaðin spyrji eg hana: Mamma, hvar er næstrafólk títt, síðan tú liggur í slíkari evju og ert misrøkt av fúlasta slag? Hon svarar: Tey eru til arbeiðis. Jamen, hvar eru heilsumyndugleikarnir og heimarøktin? Eg veit ikki, svarar hon.

Hon hevur ikki havt skil fyri at ringja til røktina og boða frá, at hon var heim aftur komin fyri fýra mán aðum síðan, heim aftur komin eftir rekreatiónsuppihald á hvíldarheiminum Nainu. Eg skilti á lagnum, at mamma var vorðin dement og skuldi hava hjálp í skundi. Síðan setti eg lækna- og heilsurøktarmyndugleikar í gongd. Søkti um umlætting á lokala røktarheimi hennara.

Jú, hon kom inn í seinastu helvt av apríl mánaði í ár, fyrst í mai ringi eg heim og vildi fáa eina samtalu við mammu. Men hetta bleiv heilt og aldeilis noktað mær og svarið var: »Henni er noktað alt samskifti við síni børn«. Børnini, ið sjálvandi eru hálvgomul í dag og sjey í tali, fingu ikki samband við hesa gomlu og verjuleysu kvinnu.

Tankarnir byrjaðu at svirra í mínum hugaheimi. Eg kom til ta niðurstøðu, at flest teirra høvdu sálarligar- ella stórar alkoholtrupulleikar, so tey høvdu sikkurt verið ágangandi móti heiminum og mammu. Hetta hevði óivað gjørt støðu teirra ótolandi og hættisliga, tískil var personalið noytt – ella rættari sagt – leiðari fyri røktini í Eysturoynni hevði ordrað personalinum at nokta øllum samskifti við hana.

Jú, eg skilti hetta væl, men góðtaka hetta vildi eg ikki. Tí, tá ið ein stillar seg fram sum roynd innan almenna og heilsurøkt, so eigur tann at skilja millum »skidt og kanel«, og lata vera við at taka øll hesi systkin yvir ein kamb. Eg bað um eina frágreiðing gjøgnum teldupost, men hetta nokar leiðarin heilt og aldeilis.

Síðan tók eg ferðaseðil til Føroya, fór inn á heimið og endiliga kom eg í samband við mammu mína. Eitt samband, ið sjálvandi ikki vartað, ið plagdi at vera, tí hon er andaliga langt vekk, men virkar tað sum um at hon hvílir í sær sjálvum. Gleðin yvir at hon hevur tað betur sosialt, psykiskt og fysiskt ger, at eg velji at longja uppihald hennara.

Nú verði eg uppringd av leiðaranum fyri røktina í Eysturoynni, hon noktar áhaldandi at grundgeva sína avgerð um at nokta mær alt samskifti við mammu. Víðari sigur hon, at tað einasta forkerta eg havi gjørt í hesum sambandi er, at eg nakrantíð havi lovað henni til umlætting á heiminum!!!

Einaferð enn verði eg kastað út í spurningin um næstakærleika. Er tað ikki bæði ábyrgd og plikt hjá røktarfólki í Føroyum at taka sær av teimum gomlu? Teimum gomlu, ið ikki longur kunnu fylgja við tí ómetaliga stóru vælferðarframgongd, ið er farin fram tey seinastu seksti árini? Teimum gomlu, ið ein langan menniskjaaldur hava tænt landið og fólki?

Men heim egnu hús, tað skuldi hon, varð sagt. Hon skuldi aftur til tað umhvørvi, ið tey so fitt og dúgliga høvdu vart hana ímót. Hetta hóast hon bæði er byrjandi dement og hevur fingið sjúkuna alzheimer.

Og nú, ja, nú situr hon aftur í egna húsi og ókrútið er við at kvala hesa gomlu, útstríddu kvinnu. Øll vita og kenna sosialu støðu hennara, men ongin ger nakað við tað, og hon, ja, hon situr bert og ruggar og heldur væl standa til.

Hvat gera tit egentliga har í Føroyum, tit ið seta tykkum sum ábyrgdarhavarar fyri røktina? Hava tit annað at taka tykkum til enn at vaska fingrar, reinsa negl, trýsta á røttu knøttarnar, so bert tey útvaldu gomlu við røttu eftirnøvnunum kunnu fáa pláss í hitastovum á heimunum hjá teimum gomlu?

Tey einastu ráð, eg fekk, áðrenn eg fór til Danmarkar vóru: Tak mammuna við tær og bið donsku myndugleikarnar hjálpa við hesum vandamáli. Er hetta tann almenni loysingartankin hjá tykkum, at deportera borgaran til Danmarkar?

# Løgin grein frá gløgga blaðmanni Dimmalættingar

**Møguliga fáa vit skil á føroyskum politikki uttan "við revolvaranum í rygginum", sum Pól á Kletti tekur til, og uttan at broyta valdømisskipanina, hesa skipan, ið hevur givið landinum ávísan dynamikk**

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður*



Eyðsýnt er, at teigurin "hinvegin" á aftastu síðu í Dimmalætting, "skal útfyllast", og ábyrgdin verður síðani "skematisk" býtt millum blaðfólk. Hvørji legu hann liggur í, verður hareftir. Av og á kreppir tú tærnar undan hesum hugleiðingum. Upprunaætlanin við teiginum hevur helst verið, at her skal sigast eitt og annað, sum "fáur annar hugsar".

Hósdagin í seinastu viku, stóð so Pól á Kletti fyri tørni. Helst átti greinin hjá Jákupi Sverra Kass fyri kortum í Dimmalætting um "valdømisskipanina" hugflogið og upprunan til orðini.

**Sammetingin við Grønland**

Jákup Sverri Kass tók sjálvandi, sum flestu, tá teir viðgera hetta málið, dømi um Grønland sum eitt mynstursamfelag, hetta landið sum samfelt fevnir um meiri enn Norðurlond, Polen, Týskaland, Niðurlondini, Stóra Bretland og Frakland tilsamans.

Grønland hevur íbúgvaratalið til felags við Føroyar og kanska partar av fiskivinnuni. Annars er einki sammetingargrundarlag.

**"Interessantir lokalpolitikarar"**

Av og á síggja vit politikarar úr høvuðsstaðnum, sum vilja gera seg "interessantar", siga, at okkara valdømisskipan hevur ábyrgd av, at samfelagið ikki virkar.

Sluppu vit av við "lokalpolitikararnar" uttanfyri Havnina, men varveittu teir í høvuðsstaðnum, varð bert gjørd ein "yvirskipan" fyri alt landið, so vóru eingi ørvitisprojekt.

Síðani tekur hesin verdugi og vitandi blaðmaður Dimmalættingar til, at "eingin fer at atkvøða sessin undan sær", "broytingin kemur ikki, uttan við revolvaranum í rygginum", "ov nógvur heimabeitispolitikkur verður rikin", (tað vil siga av útjaðarapolitikarum) og síðani sigur hann, at "upp undir val verða mong ørvitisprojektini samtykt".

**Spurningar til kjakið**

Eg skal í fyrstu syftu ikki fara nærri inn á hesi viðurskifti, og áðrenn eg geri nakað meiri, fari eg at biðja Pól á Kletti svara mær hesum spurningum, Jákup Sverri Kass, má gjarna verða við:

Hvørji ørvitisprojekt eru farin í gongd, sum ikki áttu at verið framd?

Hvør munur er á heimabeitispolitikarunum í Høvuðsstaðnum, og teimum, sum búgva úti um landið, og hvat er ætlanin við økjunum uttan fyri høvuðsstaðin?

Hvar aðrastaðni hava vit bert eitt valdømi uttan um okkum uttan í Grønlandi?

Hvørja trygd geva politikarar okkara, sum ynskja Føroyar sum eitt valdømi, at vit fáa landsstovnar, t.d. sum Landssjúkrahúsið og almennu fyrisitingina at gerast bíligari og at hesir fáast at virka, at vit fáa ein dyggari dynamikk?

Hvørja trygd hava vit fyri, at valdømisskipanin ikki verður broytt uttan við "eini "álvarsligari" hóttan í rygginum"?

Hvussu veit ein, at politikarar sum búgva í útjaðaranum fara at "atkvøða sessirnar undan sær", tá Føroyar gerast eitt valdømi?

Eingin ivi er um, at tá omanfyrinevndu spurningar eru svaraðir við skili, fáa vit veruligt kjak um evnið, sum ikki hevur verið semja um, tí her hongur so nógv uppi í málinum.

Greinin hjá Pól á Kletti er kanska ikki so løgin, tí her er talan um ein gløggan blaðmann.